# TWR KVINNUR VIÐ VIÐ VÓN

## BØNARÁHEITANIR FYRI MARS 2026

1. Harri, Tú verjir lívið hjá kvinnum í **Bolivia** og heldur teimum uppi**,** sum líða undir innanhýsis harðskapi; veit teimum trygg pláss, har tær kunnu koma at kenna Tín grøðandi og umbroytandi kærleika. (Sálmur 147:3)
2. Faðir, fyll leiðararnar í **Bonaire**  við Tínum  vísdóm**i**, kærleika, reinlyndi og samkenslu **við** fólkinum har, so at friður og einleiki kunnu valda millum samfeløgini har. (Matteus 5:9)
3. Gud, styrk, styðja og vegleið ungar, einligar **brasilskar** mammur og børn teirra, har pápin ikki tekur lut í uppalingini av børnum teirra ella forsyrgir teimum teimum. (Esaias 41:10)
4. Veit kvinnum í **Kanada** vísdóm og dirvi at kunngera Kristus á arbeiðsplássum, í skúlum og í grannalagnum. Lat lív teirra samsvara við boðskapin. (Ápostlasøgan 4:29)
5. Harri**,** reis upp kvinnur í **Kili,** sum kunnu tæna í kærleika og eyðmjúkleika í samkomuni, heima við hús og á arbeiðsplássum. Lat tær liva samsvarandi evangeliinum sum sendiboð um sátt og samhuga. (2. Korintbæv 5:20)
6. Miskunnsami Gud, lat kvinnur í **Dominikalýðveldinum** fáa starv, so tær kunnu vinna til lívsins uppihald fyri seg og síni**.** (Sálmur 90:17)
7. Faðir, ver skýlisklettur hjá kvinnum í **Honduras,** og verj tær frá harðskapi, ótryggleika og fíggjarligum avbjóðingum. (Sálmur 46:2 – ensk: 46:1)
8. Faðir, lat eina andaliga umbroyting henda í hjarta og sinni á monnum í **Meksiko,** sum fremja kropsligan og sálarliga**n** ágang móti kvinnunum, sum teir liva saman við. (Esekiel 36:26)
9. Harri, varðveit og styrk hjúnaløg og familjur í **Paraguai** sambært bíbilskum meginreglum. Lat familjur velja at vísa hvør øðrum kærleika og virðing. (1. Pætursbræv 4:8)
10. Lat toymi okkara fáa loyvi at virka í kvinnufongslum í **Uruguai**, Gud. Lat Títt evangelium seta hjørtuni á fangunum frí, so tær kunnu koma inn aftur í samfelagið og verða virdar. ( Lukas 4:18)
11. Ungar kvinnur í **USA** venda sær frá trúnni og verki trúarinnar, og fáa ikki góðan stuðul frá teimum vaksnu, sum eru um tey. Lat búnar, trúgvandi kvinnur læra tær, og lat tað sameina ættarlið. (Sálmur 78:1-4)
12. Harri, veit kvinnunum í **Venesuela** nýggja megi, í teimum truplu umstøðunum í landinum. Lat Tíni børn kenna frið og halda út. (Galatiabrævið 6:9)
13. Harri, gev kvinnum í **Bolivia,** sum tæna í kirkjum/samkomum og í samfelagnum, vísdóm, einleika og dirvi at boða evangeliið, fyri teimum illa støddu kvinnunum, sum tær veita hjálp. (2. Timoteusarbræv 1:7)
14. Harri, verj familjurnar í **Bonaire,** serstakliga viðbreknu børnini, við Tínum kærleika og tryggleika, so framtíð teirra kann verða fylt við vón. (Sálmur 91:1-2)
15. Gud, lat kvinnur, sum búgva í bygdaøkjum í **Brasil,** fáa atgongd til dygdargóðar heilsutænastur og sjúkrarøkt. **(**Sálmur 121: 1-2)
16. Faðir, kalla eitt nýtt ættarlið av kvinnum í **Kanada** til at tæna í kirkjum/samkomum, og til trúboðan. Lat samkomuna miðvíst læra og vegleiða tær**.** (Matteus 28:19-20)

17. Harri, lat mammur í **Dominikalýðveldinum** taka sær av børnum sínum, so at tey fáa ta umsorgan og vegleiðing, sum teimum tørvar, og uppala tey á Tín hátt. (Sálmur 32:8)
18. Harri, reis upp sjálvboðin í **Meksiko,** sum kunnu hjálpa toymi okkara har. Fyll tørv teirra og gev teimum skapandi evni í royndini at bera vón Jesusar til kvinnurnar í hesi tjóð. (1.Pætursbræv 4:10)
19. Prísa Gudi fyri, at í fongslunum í **Paraguai** eru ikki longur kvinnur og menn saman, og tað verjir kvinnurnar fyri kynsligari misnýtslu. Lat kvinnuligu fangarnar verða viðfarnar rættvíst og við virðing. (Hebrearbrævið 13:3)
20. Faðir, hjálp kvinnum í **Uruguai** til ikki at venda sær til rúsevni fyri at flýggja frá trupulleikum og samfelagsligum trýsti. Bjarga teimum frá at gerast bundnar av hesum rúsandi evnum og vegleið tær til at finna frælsi í Tær. (2. Korintbræv 12:9)
21. Harri, vegleið kirkjur og samkomur í **USA** at veita foreldrum, sum eru strongd, samfelagshond og hjálp. Grøð tey, so tey kunnu stuðla børnum sínum, sum stríðast við sálarsjúku. (Galatiabrævið 6:2)
22. Harri, styrk kvinnur í **Bolivia** andaliga og kensluliga, og hjálp teimum við teimum fíggjarligu og samfelagsligu avbjóðingum, sum familjan stríðist við, so vón teirra verður endurnýggjað hvønn dag. (Rómbrævið 15:13)
23. Vegleið myndugleikarnar í **Bonaire,** Harri, og gev teimum skynsemi at fremja rættvísi, fíggjarligt støðufesti, og at fólkini á oynni kunnu fáa dygdargóða skúlagongd. (Orðtøkini 2:6)
24. Nú kvinnudráp og harðskapur taka til í **Brasil**, Harri, ver Tú teirra verji og veit teimum grøðing. Umbroyt hjørtuni á teimum, sum fremja ágang. (2.Tessalonikubræv 3:3)
25. Harri, lat kvinnur í **Kanada** fáa ein inniligan og størri kærleika til Kristus og lesa Skriftina regluliga, venda við og lýða Hann. (Kolossebrævið 1:10)
26. Faðir, grøð hjørtu og sinni á offrum fyri innanhýsis misnýtslu í **Dominikalýðveldinum**. Tak burtur óttan og gev teimum dirvi til at søkja sær hálp. (Esaias 54:14)
27. Harri verj og grøð kvinnur í **Meksiko,** sum eru rændar, illa viðfarnar og neyðtiknar og misnýttar. Troysta familjurnar hjá kvinnum, sum eru saknaðar. (Sálmur 91:14-15)
28. Lat kvinnur í **Uruguai** fáa rættvísi, endurreisn og frígering frá kynsligari lokking og menniskjahandli. Lat kirkjur og samkomur bjarga teimum og veita teimum hjálp til grøðing. (Orðtøkini 31:8-9)
29. Lat eldri, trúgvandi kvinnur í **USA** stuðla yngri kvinnum, sum ynskja parlag við gudsóttandi persónar, men sum aldri hava sæð gudgivin hjúnaløg sum fyridømi. (Titus 2:3-5)
30. Harri, gev fólkinum í **Brasil** vísdóm í sambandi við politisku valini í 2026. Lat valini fara rættvíst fram uttan svik. (Dániel 2:21)
31. Lat kvinnur í **Uruguai,** sum líða undir sálarligum harðskapi, finna troyst, dirvi og endamál í Kristusi til at vinna á sínum ótta, og lat tær fáa vegleiðing til teirra lívsførslu. (Sálmur 27:1)

**”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,**
**so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!”**
**(Hebrearabrævið 4:16)**

# Ein søga um vón
# mars 2026

## Stillisliga undurverkið hjá Mariu

eftir Elisabeth Larrosa, leiðari hjá RTM í Uruguai

Nógv menniskju halda tað vera torført at trúgva, at Gud framvegis kann gera undurverk í dag, men vit fara at siga tykkum søguna hjá Mariu fyri at gleða tykkum – og kanska eisini upplýsa tykkum.

Maria hevði ikki ein eydnusaman barndóm. Hon var í vanlukkuligu støðuni at verða misnýtt kynsliga av einum, ið stóð henni nær. Hetta fekk hana at trúgva, at hon einki virði hevði sum kvinna, og úrslitið var, at hon fekk heilsutrupulleikar.

Í mong ár stríddist hon við áhaldandi bløðing, og tað ávirkaði alt hennara lív. Hon var hjá læknum, serlæknum og á sjúkrahúsi, men eingin kundi finna orsøkina ella geva henni eina sjúkugreining. Ymiskar viðgerðir tóktust at hjálpa eina tíð, men trupulleikin vendi altíð aftur, og tað førdi til bæði kropsligt og kensluligt máttloysi.

Ein dagin, tá ið hon var á einum møti, bjóðaði samkomuleiðarin teimum at koma fram, sum høvdu serstøk bønarevni. Hjartað á Mariu dukaði. Hon hevði tørv á bøn, men stóra skommin helt henni aftur. Hon vildi ikki, at onnur skuldu vita, hvat ið henni var fyri, so hon var verandi í sessinum.

Tó, júst har, í tøgnini og við afturlatnum eygum, læt hon upp hjarta sítt fyri Gudi. Hon yvirgav sjúku sína til Hansara og segði, at um tað var vilji Hansara at grøða hana, leit hon á, at Hann vildi gera tað. Tað var ein einføld, innilig bøn – full av trúgv og áliti.

Tíðin gekk,  og ein dagin, tá ið hon lurtaði eftir sendingini *Kvinnur við Vón*, hoyrdi hon, at samtalað var um bíbilsku frásøgnina um blóðsjúku kvinnuna, sum Jesus grøddi. Maria kendi seg aftur í hesum – tað var eins og tey tosaðu um hana.

Tað løtuna mintist hon bønina, hon hevði biðið á møtinum nakrar mánaðar frammanundan. Við eitt varnaðist hon, at tað vóru fleiri mánaðir síðani, at hon hevði bløtt! Undrið var hent, uttan at hon hevði varnast júst løtuna. Gud hevði virkað í tí stilla, tó við mátti.

Maria heldur fram í dag at lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum, og við gleði sigur hon eisini øðrum kvinnum frá tí, ið er hent henni, so tær eisini kunnu finna trúgv og vón og verða lívgaðar. Lív hennara er ein livandi vitnisburður um, at Gud framvegis fremur undurverk.

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

*KVINNUR VIÐ VÓN*
*twrwomenofhope.org*

**Eeva Vähäsarja: ”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”**

**Fíggjarstuðul:**
**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**
**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**
**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**
**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**